Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Troling innanfyri 12 fjórðingar og støðan í útróðrarflotanum

Spurningar:

1. Hvat er orsøkin til, at landsstýrismaðurin nú ætlar at loyva trolarum inn um 12 fjórðingar at kappast við útróðurin í eitt munandi longri tíðarskeið enn í dag?

2. Metir landsstýrismaðurin, at hetta er í samsvari við umsitingarætlanina, ið skal tryggja burðardygga veiðu?

3. Kann landsstýrismaðurin greiða nærri frá, hví royndarverkætlanin millum aktørar í bólki 4T, Faroe Island Sustainable Fishing (FISF) og Havstovuna, ið skuldi vera 3 ár, ikki er grundarlag fyri kunngerðarbroytingini longur ?

4. Kann landsstýrismaðurin útgreina, hví kunngerðin skal lýsast við einum lívfrøðiligum grundarlag frá Havstovuni 12. januar, tá ið Fiskivinnuráðið, ið umboðar vinnuna, talar ímóti?

5. Kann landsstýrismaðurin vátta, at Havstovan ynskir hesa kunngerð lýsta?

6. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv hoyringarskriv viðmæla og mótmæla kunngerðini?

Viðmerkingar:
Meginfelag Útróðrarmanna óttast, at avleiðingin av at loyva trolbátunum inn um 12 fjórðingar fer at troka útróðrarbátarnar burtur og harvið leggja stein oman á byrðu hjá útróðrarflotanum. Henda ætlan økir um vandan fyri, at útróðurin fer fyri bakka.[1]

Ein onnur avleiðing er, at veiðitrýstið økist, og smærru útróðrarbátarnir verða trýstir nærri landi. Hetta kann hava óhepnar avleiðingar fyri ungfiskin. Hetta er ikki í samsvari við umsistingarætlanina, ið skal tryggja burðardygga veiðu, ið øll skipanin er samd um.

Viðurskiftini hjá útróðrarflotanum eru alt annað enn góð. Eingin hjálparpakki var til útróðrarflotan, tá ið fiskaprísirnir fóru í botn orsakað av koronu. Útróðrarflotin kom heldur ikki upp í part, tá ið makrelurin varð útlutaður.

[1] http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/04/23/m-trurin-verur-stri-taparin

Heldur enn at gera ilt verri hjá útróðrarflotanum, átti samgongan at havt fokus á, hvussu vit kunnu hjálpa útróðrarflotanum at fóta sær aftur, nú koronukreppan er um at hæsa av.

Á Løgtingi, 26. apríl

Eyðgunn Samuelsen